## Nýgg kjakbók




Herfyri gav Páll Poulsen út bókina Vitanarslóðin. Bókin viðger ymisk fyribrigdi og frábrigdi í tí føroyska samfelagnum og er ætlað sum kjakbók.

Í innganginum sipar høvundurin til føroyska samfelagið sum eitt samfelag, sum ikki riggar, men heldur fram, sjálvt um tað ikki riggar. Víðari sigur hann millum annað:

"Tað er sera áhugavert teoretiskt, at tað ber til, sjálvt um tað ikki ber til. Fyri at føroyingar skulu standa við ábyrgd, noyðast vit at seta intelligens við, annars gongur tað ikki. Tað nyttar einki, at tyrlan stendur á flogvøllinum, tá ið sjómenn drukna úti á havinum. Samfelagsliga sjúkan er mental, tí mentalt eru vit ikki vorðin "airborne", soleiðis at vit kunnu skapa veruliga hávitan og vísindi í Føroyum. Higartil eru vit tó komin so mikið langt, at skipanin gevur prógvini móti sær sjálvari út í bók. Vónandi fer hendan bókin at seta ferð á nakrar tankar, ið bera á annan bógv, tí hetta organiseraða óskil kann ikki halda áfram."

Vitanarslóðin er tann fyrsta í røðini Annales Kioskus Tórshavniensis. Hon er 95 síður og fæst í bókabúðunum.

**ave**

# Lena roynir seg í Noregi

**Lena og Niclas spældu mánadagin konsert í vælumtókta norska spælistaðnum Smuget, millum áskoðararnar vóru fleiri fólk úr norska tónleikaídnaðinum.**

TÓNLEIKAVINNA
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



Lena og Niclas spældu mánadagin eina konsert í Smuget, ið er eitt væl umtókt spælistað í Oslo. Talan var um eina sýnisgluggakonsert fyri fólki úr norska tónleikaídnaðinum.

Ætlanin var, at Lena skuldi hita upp fyri amerikonsku songkvinnuna Beth Hart í Oslo herfyri, hetta var ein partur av eini longri konsertrundferð hjá teimum báðum. Men Lena fekk lungnabruna og avlýsti tí síðsta part av konsertferðini m.a. konsertina í Oslo.

Umboðsmaðurin hjá Lenu hevði gjørt avtalu við plátufeløg og fyrireikarar í Noregi um at koma á konsertina við Beth Hart, tá hetta varð av ongum, varð avgjørt at halda hesa sýnisglugga konsert fyri somu fólkum.

Lena hevur norskar røtur, og hetta var eitt høvi hjá henni at kannað tær, hon segði í samrøðu við Sosialin í november, at hon gleddi seg til hesa uppliving.

Hósdagin koma Lena og Niclas til Føroyar at halda jól. Beint eftir jól fara tey í Jak Zak upptøkuhølið, at taka nøkur nýggj løg upp. Hetta er fyrst og fremst fyri at dokumentera nøkur av nógvu løgunum, ið tey hava skrivað seinastu mánaðarnar. Tá Lena og Niclas vóru í Føroyum herfyri, vóru tey í sama upptøkuhøli og tóku nøkur løg upp. Enn er ikki greitt hvussu nógv av hesum verður til eina útgávu, ella nær henda so kemur.

# Almannastovan tekur umboðsmanna-kanning til eftirtektar

**Løgtingsins umboðsmaður hevur í heyst kannað málsviðgerðina á Almannastovuni. Frágreiðing um kanningina verður nú almannakunngjørd.**

- Almannastovan fegnast um, at umboðsmaðurin metir umsitingina av sjúkradagpeningi at vera skjóta og smidliga. Somuleiðis eru vit sera fegin um, at umboðsmaðurin er væl nøgdur við viðgerðina av málum um hjálpartól, sigur Petra Johnsdóttir Joensen, stjóri á Almannastovuni. Umboðsmaðurin metir, at á hesum báðum økjum eru bert talan um smávegis trupulleikar í málsviðgerðini.

Umboðsmaðurin hevur atfinningar at umsitingini av fyritíðarpensjónsmálum, sum hann metir vera ov drúgva og innihalda óneyðugar tættir. Umboðsmaðurin mælir tí Almannastovuni til at umhugsa broytingar í mannagongdini.

- Almannastovan tekur til eftirtektar atfinningarnar at umsitingini av fyritíðarpensjónsmálum. Vit ásanna, at viðgerðin av ávísum málum hevur verið ov drúgv, og at mannagongdin eigur at verða endurskoðað við atliti til tey viðurskifti, sum umboðsmaðurin vísir á, sigur Petra Johnsdóttir Joensen.

Almannastovan er ikki samd í meting umboðsmansins av vektingini av læknaváttanini, tá støða skal takast til fyritíðarpensjón. Í nøkrum málum er støðan so greið, at læknaváttanin einsamøll er nóg gott grundarlag at taka avgerð út frá, men Almannastovan metir, at tað er ikki vanliga so.

Sambært lógini um almannapensjónir er tað fyritreyt fyri at játta pensjón til fólk undir 60 ár, at ongin møguleiki er at seta í verk endurbúgvingarfyriskipanir ella at finna eitt hóskandi arbeiði (§ 5), herundir vart starv. Harumframt sigur lógin, at inntøkuviðurskifti, arbeiðsmøguleikar, aldur, lívsstarv, útlit fyri betran ella versnan av avlamninum ella onnur viðurskifti, sum kunnu hava týdning, skulu takast við í metingini av skerda arbeiðsførleikanum.

Almannastovan metir tí, at ein sosialfaklig heildarmeting vanliga má gerast av umstøðunum hjá umsøkjaranum fyri at kunna taka støðu og gera eina tilráðing um pensjón og pensjónsstig – hægstu, miðal ella lægstu fyritíðarpensjón.

Umboðsmaðurin vísir í kanningini á, at Almannastovan í fyritíðarpensjónsmálum bara skal gera eina tilráðing, ikki taka avgerð, tí hana tekur Vanlukkutryggingarráðið.

Tá málið verður latið til Vanlukkutryggingarráðið, metir Almannastovan tað at vera klárt til støðutakan. Almannastovan ger tað neyðuga fyrireikandi arbeiðið, og hóast at hetta arbeiðið hevur tikið í so drúgva tíð í ávísum málum, so metir Almannastovan, at tað er henda fyrireiking, sum eigur at taka tíð í einum fyritíðarpensjónsmáli. Ein táttur, sum harumframt er við til at leingja málsviðgerðina munandi, er langa bíðitíðin hjá Almannastovuni eftir at fáa umbidnar serlæknaváttanir til vega.

Umboðsmaðurin vísir harumframt á, at samrøðan, sum Almannastovan hevur við umsøkjarar, í nógvum førum er óneyðug og leingir viðgerðartíðina óneyðugt. Almannastovan ásannar, at har støðan hjá umsøkjaranum er púra greið frammanundan og týðuliga framgongur av læknaváttanini, er ikki neyðugt við samrøðu. Í øðrum førum metir Almannastovan, at beinleiðis samband – samrøða – við umsøkjaran er neyðug fyri at tryggja eina neyva og rætta lýsing av umstøðunum hjá tí einstaka umsøkjaranum. Somuleiðis hevur tað týdning, at støðan eisini verður lýst sum umsøkjarin sjálvur sær hana.

Almannastovan hevur lagt stóran dent á at menna stovnin við atliti at málsviðgerð og tænastu. Starvsfólkaorkan stendur tó ikki mát við øktu fyrisitingarligu og tænastuligu krøvini og økta málstalið. Vegna skerjingar á fíggjarlógini segði Almannastovan 6 fólkum úr starvi fyri einum ári síðan, og hetta metir Almannastovan sæst aftur serliga í mun til eina longri viðgerðartíð.

Almannastovan fer nú við støði í frágreiðingini hjá umboðsmanninum at endurskoða mannagongdirnar á fyritíðarpensjónsøkinum og annars gera neyðugar rættingar í mannagongdunum á hinum økjunum, sum umboðsmaðurin hevur kannað.

